## Mandela á valfundi

Fyrrverandi suðurafrikanski forsetin Nelson Mandela fekk eina stórfingna móttøku, tá hann kom á valfund hjá gamla flokki sínum ANC á ítróttarvøllinum í Soweto um vikuskiftið. Val verður í Suðurafrika mikudagin. Mandela tók kortini ikki orðið, men teir umleið 100.000 áhoyrararnir sluppu at hoyra eina gamla bandupptøku, har tann nú 90 ára gamli Mandela minti ANC á, at tað týdningarmesta politiska málið er at beina fyri fátækradøminum í Suðurafrika. ANC hevur havt valdið í Suðurafrika síðani 1994, men hóast flokkurin hevur lagt eftir á mál, fær hann væntandi næstan 70 prosent av atkvøðunum mikudagin.



## Seta vindmyllur við Bornholm

Danski ráðharrin í veðurlagsmálum, Connie Hedegaard, hevur ætlanir um eina altjóða vindmyllulund á sjónum nærhendis Bornholm. Við Berlingske Tidende sigur ráðharrin, at hon fer at taka stig til at kanna, um tað kann loysa seg búskaparliga at gera eina havvindmyllulund, sum Danmark, Svøríki og Týskland skulu fáa streym frá. Sambært Connie Hedegaard er eitt øki, sum eitur Kriegers Flak, egnað til at eina vindmullulund, sum kann útvega nógv mikið at streymi til tvær milliónir húsarhald.

## Føroyameistarakapping í sjavsi umborð á Norrønu

**Næsta vikuskiftið verður Norrøna karmur um tríggjar sjavskappingar. Tann eina kappingin verður um føroyameistaraskapið og har eru tilsamans 20.000 krónur at vinna**

SJAVSKAPPING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Norrøna leggur frá bryggju í Havn hóskvøldið 23. apríl, verða uttan iva nógvir sjavsspælarar ímillum ferðafólkið.

Tí á hesum túrinum verður nevniliga skipað fyri trimum sjavskappingum umborð á Norrønu ímeðan hon pløgir Atlantshav.

Lagt verður til brots við kapping um Føroyameistaraskapið í sjavs og í hesi kappingini eru tilsamans 20.000 krónur at vinna.

Tá ið Norrøna fer úr Esbjerg leygardagin 25. apríl er aftur ein sjavskapping á skránni og hesaferð verða vinningarnir ferðaseðlar við Norrønu og annað.

Og sunnudagin verður rundað av við einari sjavskapping afturat og aftur hesaferð eru vinningarnir m.a. ferðaseðlar við Norrøna

Afturat hesum verður eisini undirhald á túrinum, har Regin Jacobsen fer at spæla aftur við felagssangi og tey, sum vilja sleppa at dansa, fáa eisini ríkiligt høvi til tað.

# Ætlar at loysa búfólk á stovnum úr óvirðiligari støðu



*Rósa Samuelsen er sinnað at geva búfólki á stovnum virðiligari umstøður, men tað førir fleiri útreiðslur við sær og tí kann tað gerast ein trupulleiki, ásannar hon*

**Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, fer nú at taka stig til at búfólk á teimum ymsu stovnunum kring landið ikki longur skulu missa pensjónina, men hon veit ikki um hon fær politiska undirtøku fyri tí**

BÚFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Búfólk á teimum ymsu stovnunum kring landið, skulu ikki longur missa pensjónina.

Tað ætlar Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almananmálum

Í Løgtinginum hevur Bergtóra Høgnadóttir Joensen spurt landsstýriskvinnuna um hon ætlar at gera naka við tað mannminkadi støðu, sum fólk á ymsum bústovnum koma eru í, við tað, at pensjónin verður tikin frá teimum so at tey bara fáa 1000 krónur um mánaðin í lummapengum.

Hon vísti á, at Javni hevur mælt til tað sama.

Støðan er tann, at tey, sum búgva á sambýlum, fáa fyritíðarpensjón og rinda fyri innivist av pensjónini, men tey, ið búgva á psykiatrisku deild, og tey, sum búgva á bústovnum og ellis- og røktarheimum, fáa onga pensjón, men umleið 1000 kr. um mánaðin í lummapeningi.

Tó fáa tey, sum eru fylt 67 ár, undir øllum umstøðum, eisini útgjald úr Samhaldsfasta.

Rósa Samuelsen sigur, at hon hevur málið til viðgerðar beint nú og hon er samd í, at tað er mannminkandi, at vaksin fólk á stovnum, sambýlum, missa pensjónina.

Hon gjørdi eisini greitt, at hon ætlar sær at gera nakað við hesa støðuna.

Ein leyðslig meting vísir, at skulu øll, sum búgva á sambýlum, ellis- og røktarheimum og spykiatriskum deplum og øðrum bústovnum, varðveita pensjónina, fer tað at kosta landskassanum góar 10 milliónir krónur netto.

Hon fer í næstum at taka støðu til eitt ítøkligt uppskot um at lata tey varðveita pensjónina.

Hon miðjar eftir at fáa málið loyst, so at ein nýggj skipan verður sett í verk næsta ár.

Men hon legði kortini afturat, at spurningurin er um politisk undirtøka er fyri at fremja tiltøk, sum føra fleiri útreiðslur við sær og tí fær hon onki lova.

# Ælabogin 85.900 krónur ríkari

**Leygardagin hevði orkestrið hjá teimum menningartarnaðu tiltak í SMS, har tey høvdu tombola og har málningar vórðu seldir á uppboði og tey fingu stórfingna undirtøku**

INNSAVNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Linda Andrews var eisini við á tiltakinum hjá Ælaboganum í SMS leygardagin og tað setti sín serliga dám á tiltakið*

Í Ælaboganum, sum er orkestrið hjá teimum menningartarnaðu, eru tey ógvuliga fegin í kvøld.

Í dag hava tey havt stórt tiltak í SMS í Havn, har tey høvdu tombola og har listarverk hjá ymsum kendum og viðurkendum listarfólkum, vórðu seld á uppboði.

Ágóðin av tombola spælinum bleiv 18.207 krónur og úrtøkan av uppboðssøluni gjørdust ikki minni enn 67.700 krónur.

Tilsamans vóru 23 listarverk seld og tað dýrasta var ein málningur hjá Sámal Toftenes, sum fór fyri 7000 krónur.

Í hesum sambandi var eisini ein málningur seldur á uppboði á Rás2 í farnu viku. Tað var ein málningur, sum Anrgerð Joensen hevði málað og har fall hamarin á 5.600 krónum.

Sostatt gjørdust í Ælaboganum 85.907 krónur ríkari leygardagin og tað eru tey ómetaliga fegin um.

Og sum rosinan í pylsuendanum, fingu tey eisini heilsa upp á Lindu Andrews, sum var komin framvið í SMS-men í heilt øðrum ørindum.

- Hon varð móttikin við opnum ørmum og tað gjørdi sanniliga ikki dagin verri, siga tey.

Endamálið við tiltakinum er at savna pening til luttøku á tónleikastevnu í Lillehammer í Noregi í summar.

Stevnan er ætlað orkestrum, hvørs endamál er at geva fólki við menningartarni við áhuga í tónleiki og tess leiðarum, møguleika at dyrka sín áhuga og fáa íblástur.

Listafólkini, ið stuðlaðu við listarverkum, vóru: Katrin Wardum, Kári Svensson, Hilmar J. Højgaard, Eyðun av Reyni, Zacharias Heinesen, Eli Smith, Frits Johannesen, Hergerð Joensen, Durita Dam, Edith Mørkøre, Sámal Toftenes, Elin Nora Reines, Lydia Petersen, Sigga Petersen, Absalon Absalonsen, Arnhold Vegghamar, Heðin Kambsdal, Jórunn Dánialsdóttir, Arngerð Joensen, Emma Heinesen, John Reynbú og Tróndur Patursson.

## 10 føroyingar við breki á ítróttarlegu í Svøríki

**Mitt í summar verður stór norðurlendsk barna- og ungdómlegu í Svøríki og har verða føroyingar eisini við**

BARNA- OG UNGDÓMSSTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í summar fer ítróttarfelagið fyri Brekað, ÍSB, til Svøríkis við einum ferðaliði á barna- og ungdómslegu fyri børn og ung við breki.

Stevnan er fyri 12-16 ára gomul børn og ung og úr Føroyum fara 10 íðkarar av stað.

Á leguni savnast børn og ung úr øllum norðurlondunum um tað, tey øll hava til felags, nevniliga ítróttin.

Í eina viku í døgunum frá 26. juni til 3. juli, verður svomið, spælt borðtennis og íðkað frælsan ítrótt, samstundis sum møguleiki er fyri at royna ymiskar nýggjar áhugaverdar ítróttagreinar.

Harumframt verður eisini skipað fyri undirhaldi, útferðum og diskoteki.

Hendan norðurlendska barna- og ungdómslegan verður hildin annaðhvørt ár og í ár verður hon í Eskilstuna, sum er einar 100 kilometrar vestan fyri Stokkholm.

- Legan er fyri ítróttaáhugaðan ungdóm. Men tað er ikki neyðugt at hava íðkað ítrótt fyrr, tí høvuðsendamálið við leguni er at fáa fleiri við breki at íðka ítrótt.

Av tí sama ber legan eisini dám av nógvum sosialum virksemi, sum gevur ungum í norðanlondum møguleikan at knýta vinabond, sigur ÍSB.

- Okkara royndir eru, at tey ungu koma heim við nógvum góðum upplivilsum, øktum sjálvsáliti og nógvum góðum vinum.

Tað ber eisini til at koma við á leguna, sum leiðari. Kravið til leiðararnar er, at teir eru minst 20 ára gamlir, er ítróttaráhugaðir og fryntligir.

ÍSB rindar allan kostnað fyri leiðarar.